# Mannfall í Søljuni

**Sóljan endaði síðsta kappingarár á einum 6. plássi og megnaði sostatt at bjarga sær lívinum í bestu deildini. Nú hava fleiri av stuðulsleikarunum lagt skógvarnar á hillina, og tí verður álitið lagt á ungu leikararnar hjá felagnum.**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Nýggi Søljuvenjarin, Sverri Jacobsen, ásannar, at tað sær svart út. Málið er greitt. “Vit skulu yvirliva í bestu deildini,” sigur nýggi venjarin.*

*Mynd Álvur Haraldsen*

Sverri Jacobsen er nýggjur venjari hjá Sóljuni, og tað er ikki eiti á uppgávu, hann hevur átikið sær. Sóljan megnaði við bit og slit at yvirliva í bestu deildini síðsta kappingarár, og komandi kappingarár sær als ikki væl út hjá liðnum vesturi úr Vágum. Um liðið ikki fær fleiri leikarar, ella um tær ungu ikki veruliga taka av møguleikanum, sum tær nú fáa borið upp í hendi, so er nógv, sum bendir á, at Sóljan má tungu leiðina niður í næstbestu deildina.

### Fleiri av stuðulsleikarunum eru givnar

Vit spurdu nýggja venjaran, hvat hann væntar av Sóljuni, nú hondbóltskappingin liggur fyri framman. Sverri var púra erligur, tá hann segði, at vónirnar vóru ikki av teimum bestu. “Sjey ella átta av leikarunum frá í fjør eru givnir, og hetta gevur okkum ikki góðar fyritreytir, heldur hann. Hópurin í fjør var ikki av teimum størstu í landinum, og tá sjey ella átta av tínum leikarum gevast, so er ikki lætt at vænta eitt gott úrslit. Hóast hetta, so havi eg átikið mær uppgávuna at stýra hesum liðnum, og nú ræður um at geva ungu leikarunum møguleikan,” sigur Sverri Jacobsen.

Tað er einki at ivast í, at Sverri fær úr at gera. Fía Selma Nielsen, sum í nøkur ár hevur verið millum týdningarmestu leikararnar á liðnum, fer av landinum í lestrarørindum. Tað sama ger danski málverjin Ditte Jensen. Hertha Simonsen, sum eisini hevur verið fastur fúsur millum tær fyrstu sjey, er við barn, so hon verður ikki við í ár. Hjá Sóljuni vóna tey, at Hertha verður klár til endaspælið, men tað er einki víst.

### Trupulleiki við málmanni

Ofta verður tikið til, at málverjin er helvtin av einum hondbóltsliði. Um hetta er rætt, er ilt at meta um, men tó má sigast, at málverjin er ótrúliga týdningarmikil fyri eitt lið.

Hjá Sóljuni er einki undantak í so máta. Hinvegin hava tær ein stóran trupulleika á málmansøkinum, har báðir málmenninir frá í fjør eru givnir. Ditte Jensen er farin til Danmarkar í lestrarørindum, meðan Una Jacobsen er við barn.

Sverri Jacobsen sigur, at hetta er størsti trupulleikin hjá felagnum í ár.” Eitt er, at fleiri av stuðulsleikarunum eru givnir. Verri er, at liðið nú skal út at leita eftir einum nýggjum málverja. Tað er ikki lætt at venja og leika dystir uttan ein málmann, so tað er sera týdningarmikið fyri okkum, at vit fáa ein málmann, áðrenn kappingin byrjar,” sigur Sverri.

### Málið er at yvirliva

Sóljan hevur ongantíð verið millum heilt stóra feløgini í landinum í kvinnuhondbólti. Tey síðstu árini hava tær klárað seg væl, og hava av og á fingið okkurt óvæntað úrslit. Tær hava í fleiri umførum roynt at spælt seg við í oddastríðið, men higartil hevur tað ikki eydnast teimum.

Sambært venjaranum, Sverra Jacobsen, og lyklaleikaranum, Heidi Mariu Akselsen, sum er einasti landsliðsleikarin hjá Sóljuni, so fer hetta heldur ikki at eydnast teimum í ár.

“Málið hjá okkum í Sóljuni er at yvirliva í bestu deildini, siga tey bæði. Vit kunnu ikki gera okkum vónir um nakað meir, tí at liðið er ikki nóg gott, og hópurin ikki nóg breiður. So okkara einasti møguleiki er at fáa eitt so gott úrslit sum møguligt í grundspælinum, og so royna at sleppa undan niðurflyting, tá vit koma í endaspælið,” siga Sverri og Heidi Maria.

## FAKTA – Søljuna

| | |
|---|---|
| **Stovnað:** | SÍF 1906, Søljan 1938 |
| **Formaður:** | Eina Gudmundsen |
| **Venjari:** | Sverri Jacobsen |
| **FM-heiti:** | 5 |

## – Størri ábyrgd á mínum herðum

Einasti landsliðsleikarin hjá Sóljuni, Heidi Maria Akselsen, sigur, at hetta verður eitt torført kappingarár hjá Sóljuni. “ Útímóti 10 av okkara leikarum eru givnir, so tískil sær einki serligt út hjá okkum. Fleiri av stuðulsleikarunum eru ikki við okkum í ár, og tí fer størri trýst at liggja á herðunum hjá teimum rutineraðu leikarunum.”

Heidi Maria heldur, at Sóljan ongan møguleika hevur at enda ímillum fýra tey ovasta liðini, soleiðis at tær koma at spæla í ovara bólki í endaspælinum. Tær hava tó vónir fyri framhaldandi luttøku í bestu deildini eftir hetta kappingarárið, tí koma tær í niðara bólk í endaspælinum, so ætla tær at stríðast fyri plássinum. Heidi Maria sigur, at tá skulu tær spæla ímóti trimum liðum, sum eru á sama støði sum tær, og tá skulu tær sláa til.

### Vónar at fáa fleiri leikarar í endaspælinum

Tá alt hetta er sagt, so vónar Heidi Maria Akselsen, at onkrir av leikarunum, sum ikki ætla at spæla í ár, fara at vera við í endaspælinum: “Onkur av okkara leikarum er við barn, meðan aðrir ikki hava tíð og yvirskot at spæla á besta liðnum í løtuni. Vónandi vera nakrir av hesum tøkar til endaspælið, soleiðis at vit hava fleiri fólk at taka av, tá teir altavgerandi dystirnir í endaspælinum standa fyri framman.”

Heidi ásannar tó, at uttan mun til um so verður ella ikki, so sær svart út hjá hondbóltsfelagnum úr Vágum.



*Heidi Maria Akselsen er einasti landsliðsleikarin hjá Søljuni. Nú hava fleiri av stuðulsleikarunum lagt skógvarnar á hillina fyribils, so nógv trýst liggur á einasta landsliðsleikaranum hjá Søljuni.*

*Mynd Álvur Haraldsen*

